Frakland-Føroyar 3-0 (2-0):

# Fronsk framsýning



*ert stórspæl frá Jákupi Mikkelsen forðaði fyri, at franski sigurin gjørdist enn størri. Ikki minst mátti Thierry Henry ásanna dygdirnar hjá klaksvíkinginum, sum veruliga sýndi altjóða klassa*



**Tá stóru londini veruliga spíla seg út, er ikki stórvegis, sum føroyingar kunnu gera. Tað varð staðfest í Lens, har bert stórspæl frá Jákupi Mikkelsen forðaði fyri einum veruligum avsmurningi av føroyska fótbóltslandsliðnum**

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

Lens, Frakland: Tá Røoyar fyri 15 árum síðani trinu inn á altjóða pallin, var grundarsetningurin fyrstu árini, at vit vóru við fyri at læra. Ein veruleiki, sum aftur og aftur varð endurtikin av Páll Guðlaugsson, og sum táverandi lið-formaðurin eisini tóktist taka til sín. Ferð eftir ferð vóru boðini, at alt undir 4-0 var eitt úrslit, sum Føroyar kundu góðtaka, og í nógvar mátar var veruleikin tann sami, nú Føroyar á útivølli royndu seg móti einum av heimsins sterkastu landsliðum.

## Ov spjaddir á vøllinum

Tí hóast føroyska fótbóltslandsliðið gjøgnum árini hevur tikið seg nógv fram. Hóast spælskipanin er broytt, og dirvið er vorðið størri, so var tað ein heldur løgin kensla, sum flestu áskoðararnir mundu sita við kring leikvøllin. Í øllum førum var spenningurin ikki tann sami, sum hann plagar at vera, tá landsliðið fer í eldin. Einki hevði verið at hoyrt um møguleikan fyri eini sensatión undan dystinum, og sjálvur hevði Henrik Larsen eisini sagt, at talan gott kundi gerast um eina óbehagiliga uppliving. Tann vandin vil sjálvandi altíð vera til staðar hjá føroyingunum, men samstundis hevur liðið ofta ignorerað veruleikan, sum sigur, at mótstøðan er nógv sterkari.

Og leiklutirnir hjá liðunum báðum vóru eisini greiðir, frá fyrsta bríksli leygardagin. Frakland hevði kanska í nógvar mátar eyguni vend móti stóru uppgávuni mikudagin, tá teir skulu spæla móti Írlandi, men teir vóru so sanniliga eisini nóg professionellir, at teir gjørdu arbeiðið móti Føroyum líðugt. Og tað varð gjørt eftir púrasta greiðari uppskrift. Teir brúktu fyrstu 20 minuttirnar ella har á leið at koma á 2-0, og tá hetta var veruleiki, kundu teir taka sær meira av løttum.

Føroyingar royndu sjálvandi tað, sum teir vóru mentir, at standa ímóti trýstinum, men tað var mest sum alla tíðina til fánýtis. Ikki minst, tí føroyski miðvøllurin tóktist standa rættiliga »breiður«. Hetta merkti kanska, at Jákup og Claus í størri mun kundu forða fronsku bakkunum í at koma niðaneftir, men tað kostaði so sanniliga eisini mitt á. At Fróði og Ingi skuldu fáa tað trupult, var einki at ivast í, men tá teir so samstundis spældu tveir móti trimum, gjørdist uppgávan púrasta vónleys. Ikki minst, tá teir tríggir mótstøðumenninir itu Patrick Viera, Claude Makelele og Zinedine Zidane. Ein miðvøllur, sum væl og virðiliga mann liggja oman fyri miliardina, um tosast skal um marknaðarvirðið.

Ætlanin í uppstillingini